FRAMLØGA Í VINNUNEVNDINI TANN 10. APRÍL 2024 VIÐVÍKJANDI OGNARRÆTTI, RÆÐISRÆTTI OG LUNNINDUM Í SAMBANDI VIÐ UPPSKOT UM NÝGGJA FERÐAVINNULÓG

ALT STENDUR OG FELLUR VIÐ RÆÐISRÆTTINUM, SUM ER RÆTTARTRYGDIN HJÁ JARÐAREIGARUM OG FESTIBÓNDUM

Fyri mær eru bara tveir møguleikar.

Antin verður uppskotið tikið aftur.

Ella verður tað broytt soleiðis, at jarðareigarar og festibøndur varðveita ræðisrættin og allar kunngerðir, sum verða heimilaðar av landsstýrismanninum verða tiknar burtur.

Hava jarðareigarar og festibøndur ikki ræðisrættin, er einki eftirlit við ferðafólkunum.

Uppskotsstillarin hevur ikki gjørt sítt heimaarbeiði. Hann átti at havt fingið eitt løgfrøðiligt álit frá einum, sum er serkønur í føroyskum jarðarviðurskiftum og fyrisitingarrætti. Her verður serliga hugsað um, hvørt uppskotið er í tráð við grundlógina, og um tað ber til í einari ferðavinnulóg at kollvelta allar jarðarlógir í Føroyum.

Eisini átti uppskotsstillarin at gjørt eitt upprit um, hvat verður betri hjá ferðavinnuni við tí nýggju ferðavinnulógini. Tað tykist sum um, at uppskotið er gjørt í óðum verkum og eftir trýsti frá onkrum aktørum í ferðavinnuni.

Uppskotið er ein kokkteylur av fleiri lógum. Lógirnar, sum talan er um, eru: náttúruverndarlógin, fleiri jarðarlógir, lógir sum viðvíkja landi og kommunum og ein ferðavinnulóg.

Sum røktingarmaður í mong ár, kann eg staðfesta, at tann, sum hevur orðað lógaruppskotið, hevur einki innlit í føroyska jarðarlóg og seyðahald v.m.

Grein 1 í lógaruppskotinum ásetur, at endamálið við lógini er at hava burðardygga ferðavinnu, sum **verjir náttúruna**. Um endamálið er at økja ferðafólkatalið, so er tað beinleiðis í stríð við náttúrurverndarlógina, sum varð samtykt fyri sløkum ári síðani. Náttúruverndarlógin sigur tað øvugta og vil tálma ferðafólkastreyminum.

Hóast heitið á lógini er Ferðavinnulógin, snýr meginparturin av lógini seg um prinsippiellar spurningar um at skerja ræðisrættin hjá jarðareigarum og festibóndum at stíla fyri ferðavinnu í egnum haga og banna teimum at taka gongugjald. Hesin rættur verður fluttur til tað almenna.

Harafturat kann landsstýrismaðurin við heimild í lógini skerja ræðisrættin hjá jarðareigarum og festibóndum upp aftur meira í sambandi við ferðavinnuna. Landsstýrismaðurin fær eitt nú heimild til at gera standardavtalur, grein 5, skilhaldsreglur, grein 8, og trygdarreglur, grein 11.

Ferðavinnulógin leggur eisini upp til eina broyting soleiðis, at eigari ella festibóndi skulu siga tí almenna frá, nær farið skal verða á fjall. Hetta gevur onga meining, tí ofta verður farið á fjall í skundi, tá ein skái er.

Her til er at siga, at broytingar í jarðarviðurskiftum eiga at verða viðgjørdar í jarðarlógum og ikki í einari ferðavinnulóg. Jarðarlógirnar eru serligar á tann hátt, at tær byggja á jarðarspurningar. Ferðavinnulógin er ein generel lóg, sum ikki eigur at viðgera jarðarspurningar.

Lex-specialis prinsippið.

Sambært grein 73 í grundlógini er ”ejendomsretten ukrænkelig” – og ”ingen kan tilpligtes at afstå sin ejendom, uden hvor almenvellet kræver det” og ”det kan kun ske ifølge lov og mod fuldstændig erstatning”.

Í grein 72 í grundlógini stendur ”boligen er ukrænkelig” og « hvor ingen lov hjemler en særegen undtagelse, alene ske efter en retskendelse”.

Tað eru ongar veruligar viðmerkingar til, um lógaruppskotið er í samsvari við grundlógina. Heldur ikki er støða tikin til, um uppskotið er at meta sum ognartøkuinntriv fyri jarðareigarar við endurgjaldsábyrgd.

Dómurin, sum víst verður til í viðmerkingunum til ferðavinnulógina, um danska siðvenju frá 1969 viðvíkjandi strondum og privatum skógum, kann ikki brúkast í hesum føri. Dómurin byggir á lógina um Naturfredning, grein 54, sum viðvíkir ”strandbredder”, og ikki er galdandi í Føroyum.

Uttangarðsjørðin í Føroyum er ein framleiðsluvinna, har seyðurin gongur í haganum og etur gras á uttangarðsjørðini. Tí er talan um eitt nógv størri inntriv fyri jarðareigarar og festibøndur enn nevnt í dóminum. Jarðarviðurskiftini í Føroyum og Danmark kunnu ikki samanberast.

Tað fer altíð at vera ein torfør ítøkilig meting at siga, um eitt uppskot er í stríð við grundlógina, og sum kann hava við sær endurgjaldsábyrgd fyri tað almenna. Útgangsstøðið er, at uppskotið er generelt, tí tað umfatar allar hagarnar. Hinvegin má kunna staðfestast, at talan er um eitt sera umfatandi inntriv í ognar- og ræðisrættin, og at nakrir hagar, sum hava innrættað seg eftir verandi lógum og gjørt stórar íløgur, fara at fáa eitt stórt fíggjarligt tap av nýggju ferðavinnulógini. Tí haldi eg, at málið ikki átti at verið lagt fyri tingið, fyrr enn tað fyrilá eitt løgfrøðiigt álit viðvíkjandi grundlógini.

Føroyar hava nakrar serstakar jarðarlógir, sum eru grundaðar á Seyðabrævið og Norsku lóg. Talan er um eina siðvenju heilt aftur til landnámstíð.

Í 1908 varð ein nevnd sett at endurskoða jarðarlógirnar og gera eitt álit. Tann sokallaðið jarðarreformurin. Hetta álit er eitt ógvuliga týdningarmikið verk um føroysk jarðarviðurskifti og búnaðarviðurskifti. Formaðurin í nevndini var Christian Bærentsen, amtmaður, og táverandi sorinskrivari Christian C. Helms var skrivari í nevndini. Hesir báðir høvdu ábyrgdina av rúgvismikla arbeiðnum, sum varð gjørt.

Her fari eg at vísa til bókina hjá E. A. Bjørk, Færøsk bygderet, bind 1-3. Bjørk var sorinskrivari í Føroyum í nógv ár, og hevur gjørt stórt granskingararbeiði innan føroysk jarðarviðurskifti. Eisini verður víst til fororðini í bindi 1. Fororðini hevur Joen H. Andreasen skrivað. Hann var eisini sorinskrivari í nógv ár.

Nevndin gjørdi uppskot til nýggja hagalóg, hegnlóg, útskiftingarlóg, grannastevnulóg og landbúnaðarstevnulóg - fyri at nevna nakrar av teimum týdningarmestu uppskotunum.

Hesar lógir vórðu samtyktir umleið 30 ár seinni.

Høvuðsgrundarlagið undir hesum lógum var, at ognar- og ræðisrætturin skuldi vera hjá eigarum og festibóndum.

Ásett varð, hvørjar bygdir skuldu vera markatalsbygdir, og kærumyndugleikin í sambandi við trætumál var grannastevna, landbúnaðarstevna og yvirlandbúnaðarstevna. Lóg nr. 84 frá 31. mars í 1926 við seinni broytingum.

Á grannastevnu ber til hjá øllum høgunum at gera eina felags samtykt um, hvussu ferðavinnan í teirra markatalsbygd kann skipast. Somuleiðis verður víst á, at hagarnar eiga til dømis fjøruna saman og feitlendi saman. Ofta verður tað kallað samlaða markatalið.

Ræðisrætturin varð ásettur í grein 3 í hagalógini, grein 1 í grannastevnulógini, grein 1 í lov om indsø, grein 1 í lov om vandledninger, grein 41-43 í hegnlógini og grein 2 í fuglalógini.

Ræðisrætturin í jarðarlógini er bulurin undir allari umsiting av uttangarðsjørð í Føroyum. Verður hann skerdur, soleiðis sum uppskotið leggur upp til, verða jarðarlógirnar innantómar og meiningsleysar. Við ongum eftirliti við, hvar heimsborgarar ganga frítt, kann endin verða, at tað valdar lógloysi í høgunum.

Jónfinn Thomsen, advokatur